**INNIHALDSYVIRLIT** **SÍÐA**

| | |
|---|---|
| Kunning bygdarráðsins | 2 |
| Ársroknskapurin fyri 2015 | 9 |
| Fíggjarliga gongdin tey seinastu 5 árini | 14 |
| Høvuðstøl frá ársroknskapinum fyri 2015 | 15 |
| Rakstur | 16 |
| Fíggjarstøða | 17 |

# Kunning frá bygdarráðnum
## til borgararnar í Nes Kommunu
## í sambandi við roknskapin fyri 2015.

**Bygdarráðið**
Núverandi bygdarráð tók við pr. 1. jan 2013, og var 2015 sostatt triðja árið í hesi setuni. Fjórða og seinasta árið hjá hesum bygdarráðnum er komið væl áleiðis, og kommunuval verður 8. novembur 2016. Tey, sum manna bygdarráðið, eru: Jóhannus Danielsen, Súni í Hjøllum, Niclas Davidsen, Elin á Torkilsheyggi, Súnfríð Jacobsen, Jákup A. Olsen og Mortan Højgaard.

**Roknskapurin**
Nú ársroknskapurin fyri 2015 fyriliggur, kann staðfestast, at Nes kommuna hevði eitt yvirkot í rakstrinum upp á 6.510 tkr. Tá eru íløgurnar upp á 5.438 tkr., íroknaðar.

Samlaðu bruttoinntøkurnar frá kommunuskatti og øðrum inntøkum vóru 48.143 tkr., áðrenn rentustuðulin er frádrigin. Rakstrar- og íløgukostnaður var íalt 41.633 tkr.

A-skattainntøkan, sum var mett til 33.716 tkr., bleiv við ársenda 36.155 tkr., t.v.s. 2.439 tkr. meira enn roknað var við.

Partafelagsskatturin bleiv mettur til 800 tkr., men var, tá avtornaði, 2.296 tkr., og sostatt 1.496 tkr., meira enn mett.

Í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum pr. 1. janunar 2015, fingu kommunurnar í 2015 fyri fyrstu ferð allan inntøkuskattin av eftirlønargjøldum og afturberingar frá landinum vegna DIS, FAS og øðrum frádráttum, sum endurgjald fyri yvirtøku av eldraøkunum. Við ársbyrjan var mett, at samlaða inntøkan fór at verða 9.680 tkr., og var, tá avtornaði, 9.683 tkr., ella so at siga tað sama, sum roknað var við.

Útreiðslan til rentustuðul bleiv mett til 875 tkr., men er endaliga uppgjørd til 819 tkr., ella 56 tkr. minni enn mett.

Nettoskattainntøkan hjá kommununi í 2015, eftir frádrátt av rentustuðli, er á 47.315 tkr., ið er 11.693 tkr. hægri enn í 2014. Í fíggjarætlanini var roknað við eini nettoskattainntøku fyri 2015 á 43.321 tkr.

Skattaprosentið í 2015 var eins og undanfarin ár 20,5%.

**Fólkatalið**
Fólkatalið í Nes kommunu stóð næstan í stað í 2015.

01.01. 2015 var talið 1235 fólk, meðan tað pr. 31.12.2015 vóru 1237 fólk í kommununi, tvs. ein vøkstur við 2 fólkum.

Í 2015 blivu 14 børn fødd, og 5 fólk andaðust. Nettofráflytingin var 7 fólk.

Pr. 1. juni 2016 búgva 1255 fólk í Nes kommunu, tvs. ein vøkstur higartil í ár uppá 18 fólk. Síðani 1. januar 2014 er fólkatalið økt við 43 fólkum.

**Útstykkingar og búsetingar**
Eftirspurningurin eftir grundstykkjum hevur ikki verið stórur seinnu árini. Men nú er vend komin í, og kommunan fær nú javnan fyrispurningar frá fólkum, sum hava áhuga í at ogna sær grundstykki. Kommunan hevur ongan bíðilista. Hetta viðførir, at grundstykki og byggiloyvi beinanvegin verða játtað teimum, sum eru klár at fara undir at byggja.

Í útstykkingini fram við Gaddavegnum verða hús framvegis bygd.

Í útstykkingini fram við Lýðarsvegi, sum hevur pláss til 24 sethús, er nú rættulig ferð komin á søluna av grundstykkinum, og nøkur byggiloyvir eru givin. Pr. 1. Juni 2016 eru 11 grundstykkir eftir til sølu.

**Virkir og skip**
Botnfiskiskapurin hjá føroysku skipunum hevur seinnu árini verið á einum lágum støði. Framvegis er fiskiskapurin ikki nøktandi, men tað sær út til at línuskipini í 2015 høvdu betri inntøku, enn tey havt havt í longri tíð, hóast tað enn manglar nakað í fyri at verða nøktandi.

Seinnu árini er minni roynt á landgrunninum, men skipini hava eisini roynt aðrar leiðir. Línuskipini hava roynt nakað á djúpum vatni undir Føroyum umframt, at tey eisini royndu undir Íslandi og á Flemish Cap.

Umframt, at vánaligi fiskiskapurin seinnu árini hevur havt neiliga ávirkan á búskaparligu gongdina hjá teimum feløgum, sum dríva fiskivinnu, so ávirkar tað eisini fiskaarbeiðið á landi, við tað, at tað hevur verið minni av arbeiði í hesi vinnuni, í mun til fyri nøkrum árum síðani.

Í 2014 fór Faroe Origin undir saltfiskaframleiðslu í gamla Nyki, eftir at Vaðhorn hevði leiga virkið í 3 ár. Virkemið hevur verið støðugt, og vaksið nakað síðan byrjan. Felagið hevur ætlanir um spakuliga at vaksa um framleiðsluna. Faroe Origin selur eisini ís til skip og virkir.

Virksemið hjá Kassamiðstøðini, Fiskamarknaðinum og Landingarmiðstøðini er eisini tengt at fiskiskapinum. Landingarmiðstøðin við Toftagjógv gavst við sínum virksemi í 2015, og bygningarnir blivu seldir til alifyritøkuna Bakkafrost. Bakkafrost fer at nýta bygningarnar til sítt alivirksemi á sjónum á Skálafjørðinum, Kaldbaksfirði og í Sundalagnum. Í 2016 hevur P/F Landingarmiðstøðin á Toftum keypt Valhalla bygningin og er byrjað sítt virksemi. Landingarvirksemið heldur sostatt fram á Toftum.

Á havnalagnum við Rætt lat MJ Saltsøla upp nýggja saltsølu í 2011. Bygningurin, har saltsølan heldur til, er 2.500 m² til støddar, og er størsti bygningur av sínum slag her í kommununi. Felagið selur uml. 15.000 tons árliga.

SP/F Steinhólm hevur plattaframleiðsu á havnalagnum. Henda framleiðsa hevur vundið nakað uppá seg, síðani hon spakuliga byrjaði í 2014.

Byggivirksemið hevur verið støðugt seinnu árini, og tey, sum arbeiða innan byggivinnuna, hava havt nógv arbeiði í 2015.

Í 2015, eins og undanfarin ár, vóru tað virkir, fyritøkur, skip og bátar, saman við privatum og almennum arbeiðplássum, ið vóru tað fíggjarliga grundarlagið undir inntøkuni hjá kommununi.

**Økið við bátahavnina í Oyrunum**
Í nógv ár hevur tað verið tørvur á at dagføra vegastrekkið frá omankoyringini til Oyrarnar og norður til byggivirkið hjá KBH. Í 2015 bleiv hetta arbeiði gjørt liðugt. Omankoyringin bleiv broytt, vegurin omanfyri bátahylin breiðkaður, eisini parkeringsplássið omanfyri bátahylin bleiv gjørt liðugt. Alt økið bleiv samstundis asfalterað. Eisini blivu nýggjar el-, vatn- og kloakkleiðingar lagdar. Hetta var eisini ein partur av spillvatnsætlanini hjá Nes kommunu. Samlaða íløgan í 2015 var 1.519 tkr.

**Tekniska økið**
Nes kommuna hevur seinnu árini bøtt um arbeiðsumstøðurnar hjá teknisku deild. Umframt, at ein arbeiðshøll í nøkur ár er leiga á Heygum, eru smærri maskinamboð útvegað, m.a. ein mini gravari. Í 2015 hevur kommunan keypt høllina á Heygum, og avgjørt at keypa ein arbeiðsbil við einum minni krana, sum er komin í 2016. Íløgan í høllina var uppá 798 tkr.

**Eldraøkið**
Eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita pr. 1. januar 2015, og var árið 2015 merkt av hesum. Avgerð varð tikin um at fara í eitt javnbjóðis samstarv millum Nes-, Sjóvar og Runavíkar kommunu, nevnt Økistænastan við Skálafjørðin. Økistænastan verður stýrd av einum stýri, sum er mannað við umboðum frá nevndu kommunum og eru hesi í stýrinum: Tórbjørn Jacobsen, Magnus Rasmussen, Bárður Kass Nielsen og Jónleyg Hammer fyri Runavíkar kommunu, Artur Johansen fyri Sjóvar kommunu og Jóhannus Danielsen og Elin á Torkilsheyggi fyri Nes kommunu. Jóhannus Danielsen er stýrisformaður og Magnus Rasmussen er næstformaður.

Avgerð varð tikin um at keypa partin hjá Sunda-, Eiðis-, Fuglafjarðar- og Eysturkommunu í Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, og keyptu kommunurnar við Skálafjørðin teirra part fyri 23 mió. kr. Hetta ber við sær, at kommunurnar í Skálafjarðarsamstarvinum nú einsamallar eiga og reka Eysturoyar Røktar- og Ellisheim.

Umframt hetta avgjørdu kommunurnar í samstarvinum, at ognarparturin av sambýlunum í økinum skuldi javnstillast í mun til fólkatalið í kommununum.

Samanumtikið kann tí sigast, at vit í samstarvinum eiga allar ognirnar (Vesturskin á Toftum, Eysturoyar Røktar- og Ellisheim í Runavík, Heimið á Mýrunum í Runavík, Dagtilhaldið á Skála og Sjóvarlon á Strondum) í mun til fólkatalið í kommununum. Ognarparturin hjá Nes kommunu er 20,5% (roknað eftir fólkatalinum pr. 1. apríl 2016).

Av tí, at Nes kommuna hevur verið við í byggingini av Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi frá byrjan av og einsamøll bygt Vesturskin, so merkir broytingin í ognarviðurskiftinuum eina inntøku hjá Nes kommunu uppá 4.227 tkr., sum er inntøkuførd í 2015.

Nes kommuna hevur lagt stóran dent á eina skipaða og trygga yvirtøku av hesum stóra og týdningarmikla øki.

Síðan 2007 hevur Nes kommuna havt mattænastu til tey eldru. Mattænastan heldur til í Vesturskin, og verða døgurðar koyrdir út í heimini, fimm dagar um vikuna. Tað eru fleiri heimabúgvandi eldri fólk, sum gera brúk av hesi tænastuni. Skálafjarðarsamstavið hevur nú ábyrgdina av mattænastuni.

Eisini heldur Dagtilhaldið til í Vesturskin, har 15 – 20 kvinnur hittast 3 seinnapartar um vikuna til ymiskt ítriv. Virksemið, sum kvinnurnar sjálvar skipað, verður stuðlað av Nes kommunu.

**Heilsumiðstøðin**

Nes kommuna eigur Heilsumiðstøðina í Runavík saman við Runavíkar kommunu. Í 2013 og 2014 samskiftu kommunurnar við Skálafjørðin við Heilsumálaráðið um støðuna á kommunulæknaøkinum, serliga við atliti til at fáa fastar læknar í starv. Heilsumálaráðið hevur verið jaliga sinnað at finna loysn í hesum máli. Eftir nakrar fundir millum Heilsumálaráðið og kommunurnar við Skálafjørðin var semja um eina samstarvsavtalu, sum hevur til endamáls at kunna veita fleiri og støðugt betri heilsutænastur til borgarar í tí nýstovnaða Skálafjarðar Læknadømi. Semja var eisini um, at Heilsudepulin við Skálafjørðin verður staðsettur við læknaviðtalum til 3 kommunulæknar á Heilsumiðstøðini í Runavík. Ætlanin er, at stórur partur av heilsuveitingunum til borgarar við varandi sjúkum og eldri, við tíðini skal kunna fara fram í Heilsumiðdeplinum. Til tess at kunna røkja hesar uppgávur fara tað at starvast viðkomandi heilsufrøðingar, kostfrøðingar, farmaseutar, sálarfrøðingar, ergoterapeutar, fysioterapeutar og ljósmøður.

Arbeitt verður í løtuni við at skipa Heilsumiðstøðina soleiðis, at góðar umstøður verða til 3 kommunulæknar. Vit síggja fram til at fáa 3 kommunulæknar í føstum starvi skjótt, soleiðis sum vit øll ynskja.

**Barnaverndartænastan**

Eisini á barnaverndarøkinum samstarva vit við Runavíkar og Sjóvar kommunur. Hetta er eitt sera týdningarmikið øki, har vit alla tíðina gera okkara besta at røkja so væl, sum tilber. Barnaverndartænastan heldur til í Runavík, og har starvast 3 fólk.

**Várdagar**

Nes kommuna skipaði í 2015 á øðrum sinni fyri Várdøgum. Várdagar, sum er eitt mentanartiltak, verða hildnir í vikuni undan Bátafestivalinum, sum á hvørjum ári er fyrsta vikuskifti í mai.

**Vatn**

Nes kommuna tekur regluliga vatnroyndir, sum verða sendar til Heilsufrøðisligu Starvstovuna til kanningar.

Fyri at vatngóðskan kann vera so góð sum gjørligt, verður pumpa vatn úr Toftavatni, áðrenn vatnið minkar ov nógv í okkara vanligu vatngoymslum, og hjálpir hetta heilt væl. Men hetta økir um kostnaðin, og tí vil kommunan heita á øll í kommununi, tað verði seg privatfólk og virkir, at ansa eftir ikki at lata vatn renna óneyðugt. Tað er bæði kostnaðarmikið og skilaleyst at lata sóttreinsað vatn renna óneyðugt. Í 2015 var tó ikki neyðugt at pumpa úr Toftavatni, tí nokk var av vatni.

**Kloakkir**

Kommunan hevur sum málsetning, at øll økini í kommununi skulu hava kloakk- og vatnviðurskifti í lagi. Í øllum útstykkingum framyvir verður vatn, kloakk, el, telefon v.m. lagt í skipaðar leiðingar.

**Fríðkan**

Á hvørjum ári verður skipað fyri ruddingardegi, og borgarar hava møguleika fyri at fáa sær plantupakka. Kommunan roynir eftir førimuni at brúka nógva orku uppá fríðkan og eru m.a. fleiri ruskíløt sett upp seinasta árið.

Kommunan heitir á øll í kommununi um at taka upp órudd og lúka ókrút, sum veksur fram við vegnum, sum liggur upp at grundøkinum hjá borgaranum. Tað, at kommunan er ruddulig og væl røkt, er til gleði fyri okkum øll, sum búgva her, og eisini fyri tey, sum vitja okkum.

**Hundar**

Tað kemur ofta fyri, at íbúgvar í kommununi gera vart við, at hundar ganga leysir, og at hundaeigarar ikki taka hundalortin upp. Kommunan heitir á øll, sum eiga hund, um at hava hundin í bandi, og at hundalortur altíð verður tikin upp.

**Ansingarskipanin**

Barnaansingin er kommunal burturav, og rindar Nes kommuna í minsta lagi 70 % av útreiðslunum til barnaansingina og foreldrini í mesta lagi 30 %.

Kommunan arbeiðir alla tíðina við at veita 100% ansingartrygd.

Dagrøktin var í 2015 normerað til 28 børn, sum var ansað av 7 dagrøktarum. Spælistovan hjá dagrøktini er í leigaðum hølum við Høganesveg. Nes kommuna hevur tikið avgerð um at byggja vøggustovu í barnagarðskjallaranum, og at dagrøktin heldur uppat. Arbeiðið við vøggustovuni byrjaði í 2015, og verður liðug og klár at taka í nýtslu eftir summarfrítíðina í 2016. Væntandi kemur kostnaðurin av vøggustovuni at verða um 6,0 mió. kr. Í 2015 eru 2.168 tkr. brúkar uppá vøggustovuna.

Nes kommuna gevur øllum børnum í aldrinum 3 – 6 ár tilboð um at koma í barnagarð. Barnagarðurin er ein ítróttarbarnagarður, sum leggur dent á, at børnini hava nógvar rørslur í gerandisdegnum.

Barnagarðurin er á Svangaskarði og seinast útbygdur í 2011. Í 2014 er íløga gjørd í nýggjar uttanduraleikar við barnagarðin á Svangaskarði.

Í 2015 hevur barnagarðurin í miðal hýst 90 børnum. Talan er um 5 stovir, sum hava hesi heitir: Gullsóljan, Dreymasóljan, Sóldøgg og Sólareyga. Í 2015 hevur harumframt verið ein smábarnastova í barnagarðinum, men hon verður ikki eftir summarferiuna í 2016, tá vøggustovan verður tikin í nýtslu.

Vanliga eru børnini í smábarnastovuni yngri enn 3 ár, 3-5 ár eru í Gullsóljuni, Dreymasóljuni og Sóldøgg, meðan børnini í aldrinum 5-6 ár eru í skúlabólki, í Sólareyga.

*Skúlabólkurin:*

Stórur dentur verður lagdur á at gera børnini í skúlabólkinum klár til fólkaskúlan, og tí er eitt formligt samstarv millum barnagarðin og Tofta skúla. Barnagarðurin og skúlin samstarva um ta málsligu menningina gjøgnum spæl. Endamálið er at byggja brýr millum stovn og skúla samstundis, sum fakbólkarnir samstarva á námsfrøðiligum grundarlagi. Skipaða samstarvið er grundað á verkætlanir, sum Jørgen Frost, kendi professarin og granskarin, hevur gjørt bæði í Danmark og Noreg. Í Danmark kallast hetta samstarv "jul til jul" meðan her á Toftum kallast tað "frá jólum til jóla".

Samstarvið millum barnagarðin og skúlan er skipað soleiðis, at frá januar er komandi føroysktlærarin knýttur til arbeiðið í skúlabólkinum í barnagarðinum nakrar tímar um vikuna, og tá

børnini byrja í skúla í august, verður námsfrøðingurin knýttur til arbeiðið í 1. flokki í skúlanum nakrar tímar um vikuna. Ætlanin er at økja um tilboðið soleiðis, at komandi roknilærari eisini verður knýttur at skúlabólkinum.

Frítíðarskúlin er normeraður til 40 børn úr 1. og 2. flokki og heldur til á Brekkukletti.

Dagrøktin og Barnagarðurin lata upp kl. 07.00, og barnaansingin er tí opin frá kl. 07.00 til 17.15. Um ein familja hevur meiri enn 2 børn í ansingarskipanini, er 3. barnið ókeypis.

**Ungdómshús**
Í 2011 lat Ungdómshús upp í bygdini. Hetta er eitt tilhaldstað, fyri tey ungu millum 13 og 18 ár frá Nes og Runavíkar kommunum. Hildið verður til í bygninginum hjá Bank Nordik á Toftum. Ungdómshúsið er eitt tiltak, sum Blái krossur tók stig til og umsitur. Kommunurnar stuðla arbeiðinum við at gjalda lønina til leiðaran.

**Skúlin**
Í 2008 gjørdi kommunan stóra íløgu í ein nýggjari og størri skúla, sum roynist avbera væl. Eisini nýggja fimleikahøllin roynist væl og er fult upptikin um vetrarnar.

Trygdin eftir skúlavegnum hevur høga raðfesting hjá kommununi, og verður tað eftir førimuni arbeitt við at skipa og tryggja spæliøkið og atkomuvegin til skúlan best møguligt. Síðani eftir summarfrítíðina í 2013, hevur parkering ikki verið loyvd við skúlan í skúlatíð, tvs. millum kl. 08-15, tó undantikið akfør til rørslutarnað. Víst verður til parkeringsøkið millum Bank Nordik og Nebo. Eisini bleiv ein ferðsluforðing gjørd sunnanfyri skúlan. Í 2014 bleiv íløga gjørd í nýggjar uttanduraleikur í skúlagarðinum. Í 2015 er økið omanfyri skúlan hampað ella gjørt soleiðis, at næmingar eisini kunnu verða har í fríkorterunum.

185 næmingar ganga í Tofta skúla í skúlaárinum 2015/16. Í fjørsummar fóru 15 børn í 1. flokk.

Í Tofta skúla starvast 19 lærarar, 5 stuðlar, 1 skrivstovufólk ½ tíð, 1 húsavørður, 7 vaskifólk, 1 fólk í svimjihøllini í sambandi við, at høllin verður leiga út og almenna svimjing.

Tofta skúli hevur í fleiri ár samstarvað við Runavíkar kommunuskúla um breytir og vallærugreinir í 10. flokki. Hetta hevur havt við sær meiri fjølbroytt útboð av breytum. Fyri skúlaárið 2014/15 høvdu skúlarnir eisini samstarv um 8. flokk og fyri skúlaárið 2015/16 fyri 8. og 9. flokk.

Ein matarskipan er í Tofta skúla, sum ger tað møguligt at bíleggja sær mat, sum verður útflyggjaður til skúlan.

Í eini roynd at fáa fleiri fólk at nýta svimjihylin, blivu tíðirnar fyri almennari svimjing broyttar í 2013. Vatnið er heitt bæði mikudagar og leygardagar.

**Bókasavnið**
Bókasavnið í Nes kommunu, sum heldur til á 2. hædd í Tofta skúla, hevur opið 2 ferðir um vikuna, mánadag frá kl. 16.00 til 18.00 og mikudag frá kl. 19.00 til kl. 21.00.
Bókasavnið hevur ein lesiring saman við bókasavninum í skúlanum við Løkin í Runavík, har tey, sum eru í lesiringinum, hittast uml. sættu hvørja viku.

**Ítróttur**
Kommunan yvirtók í 2013 ítróttarøkið á Svangaskarði frá Tofta Ítróttarfelag. Yvirtøkan fevnir um báðar fótbóltsvallirnar, uttanumøkið, áskoðaraplássini, rennibreytina, parkeringsplássini, atkomuvegin og ítróttarhúsið.

Í samstarvi við Fótbóltssamband Føroyar (FSF) bleiv byrjað uppá útbygging av ítróttarhúsinum á Svangaskarði í 2015, og sum verður liðug í 2016. Útbyggingin umfatar m.a. 2 nýggj umklæðingarrúm, venjingarrúm, og ein nýggjan uppíbygning eystanfyri, sum verður nýggja inngongdin til 2. og 3. hædd. Í hesum uppíbygningi verða eisini vesir, sum kunnu nýtast í sambandi við uttandura tiltøk og fótbóltsdystir.

Samlaða íløgan er mett til 6,0 mió. kr. Herav FSF í mesta lagi fíggjar 5,0 mió. kr.

**Tannrøkt**
Nes kommuna hevur avtalu við Tannlæknastovuna í Saltangará um barnatannrøktina, ið umfatar øll børn frá 0 ár til 18 ár, sum sambært løgtingslóg fáa ókeypis tannrøkt frá kommununum.

**Virðsgrundarlag, tilverugrund (missión) og hugmynd (visión) fyri Nes kommunu**
Í 2015 hevur Nes kommuna skipað fyri arbeiðsdøgum fyri starvsfólkið hjá kommununi, har endamálið við hesum arbeiðsdøgum var at orða virðisgrundarlag, tilverugrund (missión) og hugmynd (visión) fyri kommununa. Úrslitið av arbeiðnum var eitt tilmæli til bygdarráðið, og á bygdarráðsfundi tann 28. sept. 2015 samtykti bygdarráðið orðingina av virðisgrundarlagi, tilverugrund og hugmynd. Samtyktin er soljóðandi :

**Virðisgrundarlagið**
*Virðini eru tey grundsjónarmið, sum Nes kommuna byggir á, og sum skapa tann hugburð, sum er grundarsteinurin undir øllum tí vit gera. Virðini eru hjartað í Nes kommunu.*
**•Trivnaður**
Kommunan er savnandi, vísir umsorgan og gevur møguleikar fyri tí einstaka og familjuni at trívast, millum annað við at skapa karmar fyri frítíð og mentan.
**•Ábyrgd og álit**
Nes kommuna tekur ábyrgd. Saman, við opinleika, góðum samskifti og dugnaskapi, skapa vit álit ímillum borgara og kommunu.
**•Menning**
Nes kommuna er ein framsøkin kommuna. Við atlitið til umhvørvi og náttúru, skapa vit bestu fyritreytir fyri vinnu-, frítíðar- og bústaðarmøguleikum.

**Tilverugrund (missión)**
Tilverugrundin lýsir orsøkina, at vit eru til. Hví vit ikki kunnu verast fyri uttan. Hon sigur, hví vit gera tað, sum vit gera og er samstundis okkara lyfti til borgararnar.
**Nes kommuna – ein kommuna fyri øll.**

**Hugmynd (visión)**
Hugmyndin er okkara leiðarstjørna, sum vísir hvagar vit ætla okkum. Hon er okkara hægsta mál. Eitt mál, sum vit ikki neyðturviliga klára at fullføra, men sum vit stremba eftir, og harvið skapa góð úrslit. **Vit vilja skapa lív og ganga fremst.**

**ÁRSROKNSKAPURIN FYRI 2015**

Niðanfyri er ein stutt lýsing og samanbering av tølunum í roknskapinum við tillagaðu fíggjarætlan fyri 2015.

**RAKSTUR**

**INNTØKUR**

**Skattur**
Nettoskattainntøkan hjá kommununi í 2015, eftir frádrátt av rentustuðli, er upp á 47.315 tkr, sum er 11.693 tkr. hægri enn inntøkan í 2014. Í javnaðu fíggjarætlanini varð roknað við eini nettoskattainntøku fyri 2015 upp á 43.321 tkr.

Hækkingin í skattainntøkunum í 2015 stavar serliga frá meirinntøkunum í sambandi við, at eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita frá 1.januar 2015 at rokna. Meirinntøkan í sambandi við eldraøkið er í 2015 upp á 9.683 tkr. og stavar frá skattainntøku frá eftirlønarinngjøldum, 6.005 tkr., inntøkur frá DIS, FAS v.m.upp á 3.359 tkr. og eini tíðaravmarkaðari flyting til eldraøkið upp á 319 tkr.

Meirinntøkurnar frá vanligum skatti eru øktar samanlagt við 2.451 tkr. í 2015 samanborið við 2014. Inntøkur frá persónskatti eru øktar við 1.119 tkr., partafelagsskattur 1.320 tkr. og húsaleiguskattur 11 tkr.

Rentustuðulin er lækkaður við 132 tkr. Kommunan fekk 573 tkr. í inntøkum frá kapitaleftirlønum í 2014. Hettar er fallið burtur í samb. við yvirtøkuna av eldraøkinum.

**Brúkaragjøld**
Roknakspurin vísur eina inntøku á 6.124 tkr., ið er 1.074 tkr. lægri enn inntøkan í 2014. Í javnaðu fíggjarætlanini var roknað við einari inntøku fyri 2015 upp á 6.132 tkr.

Lækkingin av inntøku í mun til 2014, stavar serliga frá eldraøkinum. Eldrasambýlið Vesturskin bleiv pr. 01.01.2015 ein partur av Økistænastuni hjá Skálafjarðarsamstarvinum og er tí ikki longur ein partur av roknskapinum hjá Nes Kommunu.

**NETTOÚTREIÐSLUR**

Tann samlaði raksturin hjá kommununi fyri 2015 var 984 tkr. minni enn roknað var við.

**Nettoútreiðslurnar í 2015 eru býttar soleiðis:**

| tkr. | Roknskapur 2015 | Fíggjarætlan 2015 |
|---|---:|---:|
| §1. Kommunal fyrisiting | 3.980 | 4.015 |
| §2. Almanna- og heilsumál | 13.300 | 13.426 |
| §3. Børn og ung | 8.951 | 9.174 |
| §4. Undirvísing | 3.667 | 3.846 |
| §5. Mentan og frítíð | 2.683 | 2.920 |
| §6. Teknisk mál | 3.813 | 3.889 |
| §7. Kommunal virki | 2.379 | 2.487 |
| | **38.773** | **39.757** |

**§1. Kommunal fyrisiting**
Fíggjarætlanin var upp á 4.015 tkr., roknskapurin vísur 3.980 tkr., hetta er ein minninýtsla á 35 tkr. Minninýtslan er býtt, í smærri upphæddir, á ymiskar stovnar.

§1, kommunal fyrisiting, umfatar m.a. samsýningar og aðrar útreiðslur til bygdarráð, kommunufyrisiting og teknisku deild. Eisini limaskapurin í Kommunufelagnum er partur av hesi grein.

**§2. Almanna- og heilsumál**
Fíggjarætlanin var á 13.426 tkr., roknskapurin vísur 13.300 tkr., sum er ein minninýtsla á 126 tkr. Minninýtslan er býtt, í smærri upphæddir, á ymiskar stovnar

§2, almanna- og heilsumál, umfatar m.a. kostnað fyri kommunurnar part av rakstrinum av hvíldarheiminum Naina, Heilsumiðstøðini í Runavík, skúlasjúkrarøktarfrøðinginum, skúlatannlæknanum, barnaverndartænastuni, Økistænastan hjá Skálafjarðarsamstarvinum, Serflutningstænastuni, Mattænastuni, Dagtilhaldinum og fríplássum í kommunalu barnaansinginі.

**§3. Børn og ung**
Fíggjarætlanin var á 9.174 tkr., roknskapurin vísur 8.951 tkr., sum er ein minninýtsla á 223 tkr. Minninýtslan er býtt, í smærri upphæddir, á ymiskar kontur hjá stovnunum, sum hoyra undir hesa greinina.

§3, børn og ung, umfatar kostnað í sambandi við Dagrøktina, Barnagarðin, Frítíðarskúlan og Ungdómshúsið. Eisini kostnaður av stuðulunum, til børn við serligum tørvi, er við í hesi grein.

**§4. Undirvísing**
Fíggjarætlanin var á 3.846 tkr., roknskapurin vísur 3.667 tkr., hetta er ein minninýtsla á 179 tkr. Minninýtslan er býtt, í smærri upphæddir, á ymiskar stovnar.

§4, undirvísing, umfatar m.a. umsitingar- og viðlíkahaldskostnað av Tofta skúla, herundir løn til umsjónar- og vaskifólk, undirvísingartilfar, endurgjald fyri lærlingaútreiðslur (Tekniski skúli) og árligt gjald til NSR-tænastuna.

**§5. Mentan og frítíð**
Fíggjarætlanin var á 2.920 tkr., roknskapurin vísur 2.683 tkr., hetta er ein minninýtsla á 237 tkr. Minninýtslan er býtt, í smærri upphæddir, á ymiskar stovnar.

§5, mentan og frítíð, umfata m.a. musikkskúlan, kvøldskúlan, bygdabókasavnið, jóla- og nýggjárshald, stuðul til mentan og ítrótt – herundir lokalu ítróttarfeløgini og bygdasavnið, og umsiting og viðlíkahald av ítróttarøkinum á Svangaskarði og svimjihøllini.

**§6. Teknisk mál**
Fíggjarætlanin var á 3.889 tkr., roknskapurin vísur 3.813 tkr., hetta er ein minninýtsla á 76 tkr. Minninýtslan er býtt, í smærri upphæddir, á ymiskar stovnar.

§6, teknisk mál, umfatar m.a. umsiting og viðlíkahald av ymiskum ognum hjá kommununi, tó ikki teimum bygningum, sum knýta seg til ávísa grein. Herundir er eisini fríðkan, hegn og bøgarðar, kirkjugarðurin og jarðarferðir, vatnveiting, kloakkir, vegir, kavarudding, gøtuljós og viðlíkahald av rakstrargøgnum.

**§7. Kommunal virki**
Fíggjarætlanin var á 2.487 tkr., roknskapurin vísur 2.379 tkr., hetta er ein minninýtsla á 108 tkr. Minninýtslan stavar serliga frá havnini har inntøkan hevur verðið meir enn mett og úteiðslan minni.

§7, kommunal virki, umfatar m.a. renovatión, herundir IRF og Endurnýtsluvirkið, Skálafjarðar Sløkkilið og moldgoymslunar. Eisini havnalagið umfatar kommunal virkir, tvs. umsiting, viðlíkahald, el v.m. í sambandi við virksemið á havnalagnum.

**ÍLØGUR**

**Útreiðlsur/inntøkur**
Samlaða íløguupphæddin á tillagaðu fíggjarætlan fyri 2015 var 2.553 tkr., meðan roknskapurin hevði eina samlaða íløgu á 1.211 tkr., hetta er ein minninýtsla á 1.342 tkr.

**Íløgurnar í 2015 eru býttar soleiðis:**

| tkr. | Roknskapur | Fíggjarætlan |
|---|---:|---:|
| §1. Kommunal fyrisiting | 0 | 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | -4.227 | -4.103 |
| §3. Børn og ung | 2.168 | 2.200 |
| §4. Undirvísing | 75 | 100 |
| §5. Mentan og frítíð | 547 | 500 |
| §6. Teknisk mál | 1.129 | 2.271 |
| §7. Kommunal virki | 1.519 | 1.585 |
| **Íalt** | **1.211** | **2.553** |

**§2. Almanna- og heilsumál**
Tann 1. januar 2015 var eldraøkið lagt út frá landinum til kommunurnar at umsita. Nes Kommuna hevur í hesum sambandi selt sín part av Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi umframt sambýlið Vesturskin til Skálafjarðarsamstarvið fyri til samans 20.209 tkr. Nes Kommuna hevur síðani keypt sín ognarpart í øllum ognum hjá samstarvinum, sum er í mun til fólkatalið, fyri 16.032 tkr. Netto inntøku av hesum er upp á 4.227 tkr., íroknað tinglýsing og aðra javning av innroknaðum virðum við ársbyrjan 2015.

**§3. Børn og ung - íløga**
Nýggi barnagarðurin bleiv tikin í nýtslu í 2011. Í 2015 byrjaði kommunan at gera vøggustovu í kjallaranum í nýggja bygninginum. Eftir ætlan verður hesin tikin í nýtslu eftir summarfrítíðina í 2016.

**§4 Undirvísing – íløga**
Í 2015 hevur kommunan nýtt tkr. 75 til økið omanfyri skúlan.

**§5 Mentan og frítíð**
Í 2015 kostaði útbyggingin á Ítróttahúsinum á Svangaskarið Nes Kommunu tkr. 547. Útbyggingin á Svangaskarði er í samstarv við FSF.

**§6. Teknisk mál – íløga**
Í 2015 avgjørdi kommunan at keypa høllina á Heygum, har tekniska deild heldur til. Eisini bleiv peningur brúktur til brúgvar til gøtuna við Toftavatn, spillvatnsætlanina, vegin úti á Gadd, gøtuljós og byggibúning.

Í 2015 bleiv peningur játtaður til keyp av einum nýggjum kommunubili, men hesin hevði so langa leveringstíð, at hann ikki kom fyrr enn í 2016. Tað bleiv selt eitt grundstykki meir enn vænta. Tilfar bleiv útvegað til gonguteigar og vegkant til Gaddavegin. Arbeiðið á Gaddavegnum kom ikki í gongd, og tí leyp peningur av á hesi konto, eisini leyp peningur av viðv. spillvatnsætlanini.

**§7. Kommunal virki – íløga**
Arbeiðið við vegnum, parkeringsøkið, asfaltering v.m. omanfyri Oyrahavnina bleiv gjørt í 2015, herundir el-, vatn- og spillvatnsarbeiði, samsvarandi góðkendu spillvatnsætlanini hjá Nes kommunu.

**FÍGGJARSTØÐA**

**Tøkur peningur**
Nes kommuna hevði innistandandi á bók 1.513 tkr. við ársbyrjan, við árslok vóru innistandandi 6.254 tkr. ein øking á 4.741 tkr.

**Ognarar og onnur skuld**
Við ársbyrjan skyldaði kommunan 2.416 tkr. til ognarnar v.m., við árslok var skuldin 2.885 tkr. ein øking á 469 tkr.

**Veðskuld og bankaskuld**
Veðskuldin hjá kommununi var við ársbyrjan 34.600 tkr., við árslok var veðskuldin 32.071 tkr., ein minking á 2.529 tkr. Kommunan hevur onga bankaskuld.

Kommunan hevði eina rentuútreiðslu í 2015 á 831 tkr.

**Nettoskuld**
Við ársbyrjan var nettoskuldin 29.589 tkr. og við árslok 23.078 tkr., ein minking í árinum á 6.511 tkr. Í 2 ár er nettoskuldin minkað við 11.336 tkr.

Ársroknskapurin hjá Nes kommunu fyri 2015, sum er grannskoðaður av SPEKT løggildir grannskoðarar, bleiv samtyktur í bygdarráðnum hin 25. apríl 2016.

NES KOMMUNA

Ein kommuna fyri øll

*Jóhannus Danielsen*
*borgarstjóri*

**FÍGGJARLIGA GONGDIN TEY SEINASTU 5 ÁRINI**

| **Útreiðslur** | tkr. **2011** | tkr. **2012** | tkr. **2013** | tkr. **2014** | tkr. **2015** |
|---|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 3.431 | 3.698 | 3.593 | 3.910 | 3.980 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 2.923 | 3.317 | 3.510 | 4.011 | 13.300 |
| §3 Børn og ung | 8.741 | 8.576 | 9.577 | 8.765 | 8.951 |
| §4 Undirvísing | 3.221 | 4.099 | 3.775 | 3.844 | 3.667 |
| §5 Mentan og frítíð | 2.042 | 2.383 | 2.141 | 2.622 | 2.683 |
| §6 Teknisk mál | 2.132 | 3.020 | 3.626 | 2.747 | 3.813 |
| §7 Kommunal virki | 2.722 | 3.013 | 2.540 | 2.496 | 2.379 |
| **Rakstur í alt** | **25.212** | **28.106** | **28.762** | **28.395** | **38.773** |
| | | | | | |
| §20 Skattur og avgjøld | 34.125 | 34.408 | 33.443 | 35.958 | 47.315 |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn fíggjarkostnað og íløgur** | **8.913** | **6.302** | **4.681** | **7.563** | **8.542** |
| | | | | | |
| §20 Fíggjarkostnaður netto | 1.585 | 1.438 | 1.166 | 1.045 | 821 |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **7.328** | **4.864** | **3.515** | **6.518** | **7.721** |
| | | | | | |
| **Íløgur** | | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 | 0 | -4.227 |
| §3 Børn og ung | 8.317 | 322 | 75 | 95 | 2.168 |
| §4 Undirvísing | 159 | 221 | 72 | 0 | 75 |
| §5 Mentan og frítíð | 0 | 0 | 2.541 | 0 | 547 |
| §6 Teknisk mál | 104 | 770 | 176 | 539 | 1.129 |
| §7 Kommunal virki | -704 | 2.022 | 3.968 | 1.059 | 1.519 |
| **Íløgur í alt** | **7.876** | **3.335** | **6.832** | **1.693** | **1.211** |
| | | | | | |
| **Endaligt úrslit rakstur** | **-548** | **1.529** | **-3.317** | **4.825** | **6.510** |
| | | | | | |
| **Tøkur peningur ultimo** | **995** | **1.573** | **1.965** | **1.513** | **6.254** |
| | | | | | |
| **Lániskuld ultimo** | **36.412** | **34.578** | **37.034** | **34.600** | **32.071** |
| | | | | | |
| **Nettoskuld** | **32.625** | **31.095** | **34.414** | **29.589** | **23.078** |

**HØVUÐSTØL FRÁ ÁRSROKNSKAPINUM FYRI 2015**

| | 2015 ROKNSKAPUR | 2015 ÆTLAN | 2014 ROKNSKAPUR |
|---|---|---|---|
| Skattainntøka | 47.315.000 | 43.321.000 | 35.622.000 |
| Aðrar inntøkur | 0 | 5.000 | 335.000 |
| Rakstur, netto | -38.773.000 | -39.757.000 | -28.394.000 |
| Íløgur, netto | -1.211.000 | -2.553.000 | -1.692.000 |
| **Úrslit áðrenn rentur og avdráttir** | **7.331.000** | **1.016.000** | **5.871.000** |
| | | | |
| Rentur | -821.000 | -1.031.000 | -1.045.000 |
| **+Avlop/-Hall** | **6.510.000** | **-15.000** | **-4.826.000** |

| RAKSTUR | 2015 ROKNSKAPUR | 2015 ÆTLAN | 2014 ROKNSKAPUR |
|---|---:|---:|---:|
| **RAKSTUR** | | | |
| Útreiðslur | 44.897.000 | 45.889.007 | 35.591.619 |
| Inntøkur | 6.124.000 | 6.132.007 | 7.197.921 |
| **Rakstur netto** | **38.773.000** | **39.757.000** | **28.393.698** |
| | | | |
| **ÍLØGUR** | | | |
| Útreiðslur | 6.054.000 | 7.126.000 | 1.692.556 |
| Inntøkur | 4.843.000 | 4.573.000 | 0 |
| **Íløgur netto** | **1.211.000** | **2.553.000** | **1.692.556** |
| | | | |
| **RAKSTUR OG ÍLØGUR** | **39.984.000** | **42.310.000** | **30.086.254** |
| | | | |
| **FÍGGINGARKOSTNAÐUR** | | | |
| Rentur netto | 821.000 | 1.031.000 | 1.045.334 |
| Avdráttir av lánum | 2.529.000 | 2.319.000 | 2.434.801 |
| **Tilsaman** | **3.350.000** | **3.350.000** | **3.480.135** |
| | | | |
| **FÍGGJARBROYTINGAR** | | | |
| Øking av tøkum peningi | 4.741.000 | -938.000 | -451.606 |
| Aðrar fíggjarbroytingar | -760.000 | 0 | 2.842.424 |
| **Tilsaman** | **3.981.000** | **-938.000** | **2.390.818** |
| | | | |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN FÍGGING** | **47.315.000** | **44.722.000** | **35.957.207** |
| | | | |
| **FÍGGING** | | | |
| Skattur | 47.315.000 | 43.321.000 | 35.622.086 |
| Upptikin lán | 0 | 1.396.000 | 0 |
| Aðrar inntøkur | 0 | 5.000 | 335.121 |
| **Tilsaman** | **47.315.000** | **44.722.000** | **35.957.207** |

| FÍGGJARSTØÐA | 2015 ROKNSKAPUR | 2014 ROKNSKAPUR |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| Tøkur peningur | 6.254.000 | 1.513.000 |
| Millumrokningar | 5.370.000 | 5.341.000 |
| Skuldarar | 254.000 | 574.000 |
| **OGN TILSAMAN** | **11.878.000** | **7.428.000** |
| **SKULD** | | |
| Ognarar og onnur skuld | 2.885.000 | 2.416.000 |
| Langfreistað skuld | 32.071.000 | 34.600.000 |
| | **34.956.000** | **37.016.000** |
| Útjavningarkonta primo | -29.588.000 | -34.414.000 |
| Úrslit | 6.510.000 | 4.826.000 |
| **Útjavningarkonta ultimo** | **-23.078.000** | **-29.588.000** |
| **SKULD TILSAMAN** | **11.878.000** | **7.428.000** |

**Útgreinaður roknskapur kann síggjast á heimasíðuni hjá Nes kommunu, nes@nes.fo, kommunan í tølum.**